## VIÐMERKINGAR

Kanningar mugu samskipast:

# Oljuvinnan og árinið á samfelagið

**Jógvan Arge**



Líkt er til, at vit eru komin illa frá royndunum at finna útav, hvat oljuvinna undir Føroyum fer at merkja fyri føroyska samfelagið.

Eitt prógv eru orðadrátturin og ruðuleikin, sum nú hevur verið um Menas-frágreiðingina. Fróðskaparsetrið tykist vera nærum í upploysn av einari uppgávu, sum okkara fremsti vísindaligi stovnur átti at havt lagt allan dent á at loysa fyrimyndarliga.

Eitt úrslit av hesi gongdini er, at vit hava ikki enn fingið eina líkinda frágreiðing um, hvat vit skula hugsa um, og hvat vit skula gera tann dagin, oljuvinna verður í fullum blóma undir Føroyum.

Ein pulserandi oljuvinna kann vera komin inn á okkum, áðrenn vit hava fingið umrátt okkum, og enn eru vit ikki komin longur, enn at smádeilast um antin vit skula varðveita tað sera avgerandi kravið um keikantin ella ei.

**Góð ráðlegging í nítiárunum**

Men sama, um vit halda fast við, at alt skal um føroyskan bryggjukant ella vit sleppa hesum kravi, so verða samfelagsligu árinini av oljuvinnu stór í Føroyum.

Men hvussu stór verða tey, og hvat skula vit gera fyri ikki at missa okkum heilt burtur í hesum møguliga dollaradansi?

Vit eru langt aftur út í so máta. Og tað er vandamikið.

Landsstýrið hevði í nítiárunum eina oljuráðleggingarnevnd. Hendan nevndin, sum var mannað við umboðum fyri embætisverk og vinnulív gjørdi eitt dygdargott fyrireikandi arbeiði, so farast kundi undir at leita eftir olju undir Føroyum.

Nevndin lat á sumri í 1997 eitt gott álit úr hondum. Hetta álit viðgjørdi serliga tey viðurskifti, sum høvdu týdning fyri forkanningar og leiting undir Føroyum. Nevndin hevði eisini greið uppskot um mannagongdirnar hesa tíðina, og hvussu lógirnar skuldu setast saman.

Landsstýri og løgting tóku væl undir við tilmælunum, og hóast ikki øll vórðu samtykt, so er arbeiðið hjá oljuráðleggingarnevndini framvegis ein týðandi partur av grundarlagnum undir tí, sum í dag hendir í oljumálinum í Føroyum.

**Nevndin varð send til hús**

Men nú verður álitið skjótt uppi. Tá leitingarskeiðið er av, og tað kann verða so skjótt, verður væntandi næsta stigið, at farið verður undir at útvinna olju úr undirgrund Føroya.

Hesi viðurskiftini kom oljuráðleggingarnevndin ikki reiðiliga til. Hon nevndi í stuttum, at í forkanningar- og leitingarskeiðunum var neyðugt at gera útreiðingar av ymsum spurningum, sum tóku seg upp um tilstundandi oljuvinnu.

Nevnt varð, at stórt tilfar av samfelagsligum týdningi í so máta fanst í samfeløgum, sum líkjast Føroyum - eitt nú Noregi, Skotlandi, Hetlandi, Orknoyggjum, Ný Funnalandi og fleiri.

Men meir varð ikki gjørt burtur úr tá á sinni.

Nærliggjandi var at hugsa, at hendan sama nevnd í einum ella øðrum formi beinanvegin fekk til setning at halda fram við sínum kanningar- og ráðgevingararbeiði, men so varð ikki.

Samstundis sum rættiliga varð farið til makrónurnar í oljumálinum, varð oljuráðleggingarnevndin tikin av og send til hús.

**Nýggja samskipan av oljuráðlegging**

Tað var stórt spell, tí síðani hava vit ongan havt, hvørs uppgáva tað er at gera sær greitt, hvørji árinini av oljuvinnuni í veruleikanum verða, og hvussu vit skula fyrireika okkum til at taka ímóti teimum.

Oljumálastýrið hevur staðið seg væl, síðani tað varð sett á stovn, og fær viðurkenning allastaðni frá. Fremst í tess huga liggur valla at fáa greiðu á øllum hesum viðurskiftum, tí stýrið hevur úr at gera við so mongum øðrum viðurskiftum.

Loyvi mær tí at taka tráðin upp aftur og mæla til, at sett verður ein nýggj oljuráðleggingarnevnd, hvørs setningur verður at skipa fyri kanningum av árinunum av oljuvinnuni og gera tilmæli um, hvussu føroyska samfelagið í øllum lutum eigur at fyrireika seg til at taka ímóti hesi vinnu.

Diplomaturin Árni Olafsson eigur enn einaferð at verða settur at standa fyri arbeiðnum. Ráðleggingin skal verða gjørd í góðum samljóði millum oljumálastýrið og onnur stýri og umboð fyri bæði vinnulív og mentanarlív eiga at vera uppií.

Allir hesir partar høvdu dugað at sett teir røttu spurningarnar og funnið teir røttu persónarnar og stovnarnar at gjørt arbeiðið, bæði føroyskar og útlendskar.

Pengarnir eiga fyri ein part at koma frá føroyskum stovnum og myndugleikum, men ikki minst frá teimum oljufeløgum, sum hava bundið seg til at brúka stórar peningaupphæddir til júst fyrireikingar- og kanningararbeiði upp undir eina árinsmikla oljuvinnu í Føroyum.

Málið hevur skund, skula vit ikki verða tikin av fótum.

# Kósin er sett

**Súni í Hjøllum**
*Tjóðveldisflokkurin, Eysturoy*

Seinastu árini hava alsamt fleiri ásannað, at ríkisrættarliga støða Føroya er ein vavgreytur. Fyrst í nítiárunum varð prógvað ferð eftir ferð, at vit livdu í einum ábyrgdarleysum og ótryggum samfelag, sum rakti tey veikastu meinast. Føroyingar vórðu bundnir niður av politiskum krepputiltøkum, sum høvdu við sær, at fleiri túsund føroyingar vórðu noyddir at fara frá húsi og heimi. So at siga ongin hevði álit á samfelagsskipanini - hvørki í Føroyum, Danmark ella í útheiminum.

Búskapurin og vinnulívið í Føroyum vórðu við tíðini vorðin alsamt meira avlagað, so hvørt sum peningastreymurin úr Danmark øktist. Føgru orðini um, at hetta var hjálp til sjálvhjálp, hildu ikki. Avleiðingin varð stutt sagt, at vinnulívið í stóran mun als ikki stóð á egnum beinum, men hóraði einans undan, tí almennur rakstarstuðul varð latin. Á henda hátt hevði vinnulívið ongar tryggar karmar at menna seg undir.

Á løgtingsvalinum 30. april 1998 bjóðaði tjóðveldisflokkurin seg fram til at endurreisa samfelagið á nýggjum grundvølli. Tjóðveldisflokkurin gjørdist størsti flokkur á tingi, og flokkurin fekk sostatt álitisváttan frá veljarunum saman við øðrum góðum kreftum í okkara landi at skipa eitt føroyskt demokratiskt samfelag, har øllum borgarum verður tryggjað grundleggjandi og javnbjóðis rættindi – rættindi, sum ríkisfelagsskapurin við Danmark ikki hevði megnað at tryggja.

Eftir valið eydnaðist tjóðveldisflokkinum at koma í samgongu, og sjálvstýrissinnað fólk í Føroyum kunnu nú staðfesta, at søguliga "Samgonguskjalið" setti ferð á skipaðu loysingina. Vit er mong, sum høvdu hugsað okkum, at tað gekk skjótari, men føroyingar hava ongantíð áður verið so nær einum sjálvberandi búskapi.

Føroyingar eru eitt dugnaligt og arbeiðssamt fólk. Nú hava vit eisini eitt stolt og sjálvberandi vinnulív. Nú hava vit sum fólk veruliga møguleika at seta okkum greið mál á øllum samfelagsøkjum – fyri allar føroyingar, yngri sum eldri. Frælsiskósin er sett, men langt er á mál.

Sterkar kreftir vilja nú leggja stilt og venda aftur til tað ótryggja sambandið, ið tekur alla ábyrgd burtur. Vinna hesa røddir løgtingsvalið, býður ikki bøtur, vit falla aftur í heimastýrisgarðin og studningsmeldurin, sum leiddi land og fólk út í ófrælsi og fátækradømi.

Tað er mín vón, at allar góðar sjálvstýrishugaðar kreftir í landi okkara standa saman um frælsisstrembanina.

Frælsiskósin verður hildin við tjóðveldisflokkinum í landsins leiðslu!

# Føroysk mentan – týdning fyri samleika, vinnulív og vælferð

**Kristina Háfoss**
*Løgtingsvalevni Tjóðveldisfloksins*

Alheimsgerðin ber við sær, at mørk millum lond hvørva og at mentanir kring allan heim líkjast alsamt meira. Samstundis sóknast fólk alsamt meira eftir øðrvísi og serstøkum mentanum. Mentan hevur tískil í dag ikki bert týdning fyri samleikan og vælferðina hjá eini tjóð, men fær somuleiðis alsamt størri búskaparligan týdning.

**Týdning fyri føroyskt vinnulív**

Mentan føroyinga er við til at ríka hvønn einstaka føroying eins væl og henda er ein avbera góð umboðan av Føroyum í umheimi okkara. Eitt nú hava føroyskar bókmentir og føroyskir listamálarar fingið heiðurlønir og viðurkenning í útlondum og somuleiðis eru føroyskir sniðskerar og tónleikarar, ið liva av at bera fram teirra list í útlondum. Somuleiðis hava ítróttarfólk okkara verið virkin umboðsfólk fyri Føroyar í útheimi.

Hetta er alt við til at gera umheimin varugan við, at har er eitt lítið land við ríkari mentan uppi í Norðuratlantshavi, ið eitur Føroyar. Hetta hevur so avgjørt positiv árin á føroysku útflutningsvinnuna og ikki minst á ferðavinnuna.

Somuleiðis gerast vinnur, ið eru grundaðar á mentan - eitt nú innan tónleik, bókmentur og film - í alsamt størri mun vinnur, ið hava stóran búskaparligan týdning fyri grannalond okkara. Vinnur grundaðar á mentan fara óivað eisini at fáa størri leiklut í føroyskum vinnulívi í framtíðini.

Tað átti tískil at verið sjálvsagt, at føroyska vinnulívið og tað almenna vóru saman um, at gera karmarnir fyri føroyskari mentan betur.

**Betri karmar**

Mentan er eitt umfatandi fyribrigdi, ið fevnir um allan okkara gerandisdag. Eg fari tískil bert at nema við partar av føroysku mentanini, ið eg meti hava tørv á, at fáa betur karmar.

- SVF skal raðfestast hægri og fáa hægri játtan á fíggjarætlanini
- Tjóðarleikpallur og listaskúli skulu byggjast
- Mentanarhús til ungdómin í kommunum runt allar Føroyar
- Føroysk mentan raðfestast enn hægri í skúlunum
- Skráseta øll føroysk fornminnir og endurskoða friðingarlóggávuna sum skjótast
- Betri karmar til listafólk eitt nú umvegis hægri játtan til Mentanargrunnin
- Størri stuðul til bókmenta-, tónleika-, sjónleika- og filmsframleiðslur v.m.

Verður bøtt um karmarnar við omanfyristandandi tiltøkum, vil hetta geva føroyskar mentan munandi betri møguleikar at liva og mennast í føroyska samfelagnum.

**Týdning fyri samleika og vælferð**

Føroyingar mynda føroysku mentanina og føroysk mentan myndar føroyingar. Mentan er avgerandi fyri samleikan og vælferðina hjá eini tjóð og er føroysk mentan nakað, ið vit føroyingar kunnu standa saman um og kenna okkum sjálv aftur í.

Alheimsgerðin ber við sær, at mørk millum lond hvørva og at mentanir kring allan heim líkjast alsamt meira. Føroyska samfelagið byggir tó í dag á ein sterkan mentanararv, ið hevur yvirlivað hóast mótgang og fer føroysk mentan eisini í framtíðini, at menna seg í samanspæli við útlendskar mentanir, um karmarnir verða teir røttu. Tað er tískil avgerandi, at vit gera okkara til, at skapa karmar soleiðis, at mentan okkara kan liva og mennast - til frama fyri samleika, vinnuveg og vælferð okkara.

*www.hafoss.com*



## VIÐMERKINGAR

# Tjarnargarður nýggjur fyribyrgjandi stovnur

**Elin Lindenskov,**
*býráðslimur í Havn*

Tórshavnar Býráð samtykti hóskvøldið, at Tjarnargarður skal brúkast til røktarfyribyrgjandi stovn til heimabúgvandi pensiónistar. Tjarnargarður verður nýggja navnið á Marinustatiónini við Hoyvíkstjørn, tá í kommunan komandi summar yvirtekur bygningin.

**Uppvenging og umlætting**

Ein partur av bygninginum skal brúkst til uppvenjing og umlætting fyri heimabúgvandi pensiónistar. Uppvenjingarstovan verður skipað við eini ergo- og fysioterapi, har sjúklingar kunna búgva í longri tíðarskeið, meðan tey fáa uppvenjing aftan á sjúkraviðgerð.

Talan kann eisini vera um fólk, sum ikki kunna fara heim beinanvegin, tí broytingar skulu gerast í heiminum. Fólk kunna eisini koma á Tjarnargarð fyri at meta um støðuna hjá teimum, soleiðis at tey fáa røttu viðgerðina.

Í Danmark hava tey sera positivar royndir við uppvenjingarstovum. Ofta hendir tað góða, at sjúklingurin fær so mikið góða likamliga og sálarliga røkt, at hann gerst meira sjálvbjargin og kann flyta heimaftur heldur enn á røktarheim.

**Dagstovnur til heimabúgvandi minnisveik**

Ein partur av bygninginum skal brúkast til dagstovn hjá heimabúgvandi minnisveikum. Minnisveik er ein samfelagsbólkur, sum er sera illa fyri í dag. Eitt dagtilboð til minnisveik kann verða við til at menna tann minnisveika, samstundis sum tað lættir um gerandisdagin hjá avarðandi. Við hesum tilboð er kommunan við til lætta nakað um umstøðurnar hjá minnisveikum. Tað næsta stigið verður at byggja røktarheim til minnisveik. Arbeiðið við einum røktarheimið til 16 minnisveik er væl á veg. Tilboðini uppá byggjing eru komin inn. Vónandi gongur tað ikki lang tíð, áðrenn arbeiðið fer at byrja.

**Lívsgleði og trivnaður í hásæti**

Við samtyktini hóskvøldið er býráðið komi eitt stig longri við tí eldrapolitikki, sum var stungin út í korti í desember 1999 í álitinum »Tey gomlu í Tórshavnar kommunu«. Vónandi heldur hesin politikkurin fram, til vit ein dag kunna bjóða okkara gomlu eitt virðiligt lív, har lívsgleði og trivnaður er í hásæti.

*www.lindenskov.com*
*elin@lindenskov.com*

# Fullveldiseksperimentið

**William Max Hansen**
*Valevni Javnaðarfloksins, Eysturoy*

Fullveldisekperimentið hjá samgonguni hevur higartil kostað føroyingum hundratals mió. krónur í útreiðlum og mistum inntøkum, harnæst kemur so tann haturskenda spjaðingin í fólkinum, við teimun sonevndu rættu ella ikki rættu føroyingumum.

Fullveldi ella tjóðarfrælsi á papírinum, kann als ikki einsamalt tryggja okkum nakað sum helst. Var tað so einfalt, at fullveldi gav okkum veingir, so tók eg eisini undir við loysingini nú, men soleiðis er tað jú ikki hjá øllum, langt ífrá tí.

Man kann so spyrja seg sjálvan, hvør fylgir við tíðini, teir ella vit sum siga: FÓLKIÐ FYRST. Tí eitt er vist, avleiðingarnar eru tíðiligar, tað skal eg koma aftur til eitt sindur seinri.

Fullveldisverkætlanin er ein ætlan uttan nakað ítøkiligt atlit til lívsfrælsi og lívskvalitet føroyinga. Tað tekur als ikki hædd fyri, at nútíðar føroyingurin longu hevur eina sosiala tilvitan, sum krevur eitt samhaldsfast lívsfrælsi við nøktandi lívskvaliteti, har andaligt og hugsjónarlig frælsi er ein sjálvfylgja, og har nøktandi fíggjarviðurskifti skulu til fyri at geva realistisk spælirúm fyri persónligum og sosialum frælsi. Viðhvørt kann ein fáa tað fatan, at hin ágangandi nationalromantiski fullveldisdreymurin í ov stóran mun verður borin uppi av einari ella aðrari undirlutakenslu, tí tað er loysing fyri loysiningina skyld - kosta hvat tað vil.

Gongdin á arbeiðsmarknaðinum undir loysingarsamgonguni vísir klárt, at fólk vil hava lívsfrælsi og lívskvalitet heldur en nationalromantisk fullveldi. Tey mongu verkføllini innan flestu vinnugreinar hava verið fyri persónliga at fáa rúmsáttari fíggjarkarmar og harvið størri lívsfrælsi og lívskvalitet. Vit kenna øll gongdina. Einki av hesum verkføllum hevur verið til gagn fyri fullveldissakina. Einvegis avgerðin um niðurskurðin av blokkinum í ótíð uttan fyrst at seta seg inn í veruliga fíggjarliga tørvin bæði innan skúlaverkið, almannaøkið og heilsuverkið talar fyri seg. Føroyingar eru eisini nú so smátt farnir at merkja avleiðingarnar av fullveldissparingunum. (sparing skal valdast)

Trupulleikar á skúlunum grundað ov lítla játtan. Sjúkrasystrarnar á landssjúkrahúsinum fóru í verkfall fyri at vísa á tær praktisku avleiðingarnar av fullveldissparingunum og tað fíggjarligu niðurpíningina á heilsuverkinum. Ansingartrupulleikar á barnaøkinum og tann mestsum skandaløsa støðan á eldraøkinum skulu eisini síggjast sum ein fullveldisavleiðing. Alt hetta er bert ein byrjan, tí blokkurin fór ikki at minka fyrrenn 1. Januar í ár. Men uttan mun til, hvussu leikur fer, so hevur hendan samgongan verið føroyingum dýr, og teirra fullveldiseksperiment hevur longu nú máað av okkara lívsfrælsi.

**Hetta vil javnaðarflokkurin:**

Samstarv í ríkisfelagsskapi Javnaðarflokkurin ásannar, at samstundis sum kósin er sett móti politiskum sjálvstýri, gerst tað uppaftur meira neyðugt, at Føroyar ikki verða avbyrgdar við at avsiga sær samstarvsmøguleikar. VIT HAVA BRÚK FYRI altjóða samstarvi, og norðurlenskum samstarvi. Men serliga hava vit brúk fyri tí samstarvi, sum ríkisfelagsskapur er karmur um: Í ríkisfelagsskapinum hava føroyingar í dag stórar ítøkiligar fyrimunir á t. d. útbúgvingarøkinum, sjúkrahús- og heilsuøkinum annars, tí sosiala økinum, tí fyrisitingarliga økinum, arbeiðsmarknaðarøkinum, uttanríkisøkinum, tí tøkniliga økinum og tí mentunarliga økinum. At avsiga okkum samstarv í ríkisfelagsskapinum er at avsiga okkum tann sjálvsagda rættin til hesar fyrimunir. Javnaðarflokkurin ásannar, at tað verður eitt strævið og tógvið stríð at vinna Føroyum búskaparligt sjálvbjargni við einum minkandi ríkisstuðuli, samstundis sum vit ikki bert varðveita men eisini framvegis skulu menna tað føroyska vælferðarsamfelagið. Tí hava vit brúk fyri tí rætta samstarvi. Sum kann fáast í ríkisfelagsskapi. Eisini fyri at eiga møguleikar at finna serstakar loysnir, tá umstøður ikki eru okkum til vildar.

Javnaðarflokkurin ásannar, at búskaparliga støðið undir føroyska vælferðarsamfelagnum eigur at vera grundað á okkara egnu framleiðslu. Tí vil Javnaðarflokkurin, at ríkisveitingingarnar verða brúktar at styrkja sjálvbjargni í Føroyum.

Sjónarmið okkara er, at peningaveitingin millum partar í einum ríkisfelagsskapi hava til endamáls at tryggja øllum eitt virðiligt lív. Veitingarnar frá danska statinum til Føroya er ikki olmussa, men natúrligur rættur í tí samstarvi, sum ríkisfelagsskapurin er karmur um.

Tað er langt síðani, at javnaðarflokkurin ásannaði, at neyðugt var at fremja djúptøknar broytingar í ríkisrættarviðurskiftum Føroya. Bæði í samgongu og í andstøðu hevur Javnaðarflokkurin skotið upp, at verandi heimastýrislóg verður avtikin, og sett verður ein sjálvstýrislóg ístaðin, sum ruddar slóð fyri veruligum sjálvræði.

Ríkisfelagskapurin Føroyar og Danmark ímillum eigur, sum lagt í stjórnarskipanina fyri Føroyar 23. Mars 1948, at botna í tí fulla og óskerda mannafrælsinum.

Hetta vil í hesum føri siga, at báðum tjóðunum, teirri føroysku sum teirri donsku, er frítt at fara úr stjørnarliga og fíggjarliga felagsskapinum, um eitt mál ella eitt málsøki verður yvirtikið, soleiðis at Føroya løgting og landsstýri taka við teirri lógarligu, fíggjarligu, umsitingarligu og siðmenningarligu ábyrgdini av málinum ella málsøkinum.

Hesin "generelli" rættur til báðar síður røkkur líka at loysingini. Spurningurin er tí sera einfaldur, vilt tú sleppa út úr ríkisfelagsskapinum er eingin foring.

Javnaðarflokkurin leggur doyðin á, at allar broytingar og nýskipanir verða framdar á tryggum grundarlag, til tess at føroyingar ikki við sjálvstýrinum missa meir fyri minni.

Javnaðarflokkurin leggur tí alstóran dent á, at arbeitt verður við ábyrgd og við skili framímóti støðugt øktum sjálvstýri. Hetta merkir m.a., at fíggjarligu og umsitingarligu fortreytirnar skulu vera í lagi áðrenn yvirtøkur verða framdar, dentur verður lagdur á yvirtøkur av øllum málsøkjum, tí

Javnaðarflokkurin heldur føroyingar vera best førar fyri at taka avgerðir, sum viðvíkja føroyingum sjálvum, innanfyri ríkisfelagsskapin.

# Norðoyatunnilin - politisk kastibløka

**Sune Jacobsen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin í Vágum*

Tann, sum vil einum máli væl, roynir eftir førimuni at fyrireika hetta so væl, at eingin kann seta ein fingur á nakað.

Soleiðis er ikki við málinum um Norðoyatunnilin. Fyri at gera seg sjálvar áhugaverdar, vevja løgmaður og Karsten Hansen alt upp í ein ellubita, og leggja fyri tingið, tveir tímar fyri evsta mark, eitt uppskat, sum ikki er borðbart og tí ikki kann verða samtykt, tí har er einki at samtykkja.

Hvussu leikur fer, kann tíðin bert vísa, men verður hetta málið samtykt í verandi líki, eigur eitt ískoyti at verða sett í frágreiðingina um 80- árini, nevniliga hetta.

Fyri at alt ikki skuldi enda í einum hurlivasa aftur eftir 80-árini, varð roynt at stramma tingini upp. Nýggj ting- og stýrisskipan varð fingin til vega, sum skuldi seta skott millum lóggevandi og útinnandi valdið, ella millum løgtingið og landsstýrið.

Løgmaður fekk víðar heimildir, og tað fekk hann sjálvandi, tí teir sum skrivaðu stýrisskipanina roknaðu við, at tað var so frægur ryggur í løgmanni, at hann dugdi og tordi at brúka hesar heimildir.

Sosialurin hevur í smálutum lýst fyri okkum, hvussu málið um Norðoyatunnilin, tveir tímar fyri evsta mark, varð skrumblað ígjøgnum, og helst verður sent aftur í høvdið á løgmanni.

Bjarni Djurholm, sum umsitur málið, sigur, at málið er so ófullfíggjað, at hvørki hann ella umsitingin í Vinnumálastýrinum kundu leggja navn til. Hvør í umsitingini so hevur lagt navn til, veit eg ikki í skrivandi løtu, men løgmaður vildi ikki sita eftir við Svarta Peri, og tí sendi hann í bráðskundi málið niðan á løgtingsskrivstovuna.

Nú er tað soleiðis við einum Svarta Peri, at hann hvørvur ikki út í bláa luft. Málið endar fyrr ella seinni í eini nevnd, og tá kemur nevndin at sita eftir við honum, allar helst Heini O Heinesen.

Onnur umbering hjá løgmanni var, at um hann ikki legði málið fram, so hevði onkur annar landsstýrismaður gjørt tað, og so kundi tað verið brúkt ímóti mær politiskt í ólukkumát.

Hetta er tvætl frá byrjan til enda. Løgmaður samskipar arbeiði hjá landsstýrismonnum, og tí hevur hann regluliga landsstýrisfundir, har øll uppskot verða framløgd, áðrenn tey verða løgd fyri løgtingið. Skuldi tað hent, at t.d. Karsten Hansen á einum landsstýrisfundi segði, at hann fór at leggja málið um Norðoyatunnilin fram, kundi løgmaður víst honum á grein 33 í stýrisskipanarlógini, sum gevur løgmanni heimild at senda Karsten Hansen tvørtur um Leirvíksfjørð sama dag sum fyrrverandi landsstýrismann. Men hetta er sjálvandi ein spurningur um at tora at vera løgmaður.

Hvat skal so løgtingið taka støðu til? Løgtingsmálið skal geva P/F Norðoyatunnlinum heimild at gera veg og tunnil millum Eysturoy og Borðoy. Men í málinum eru viðlagdar níggju ymiskar linjuføringar.

Tá málið verður beint í Vinnunevndina, skal Heini O Heinesen geva tinginum eitt tilmæli. Í álitinum skal hann mæla tinginum til at samtykkja ella ikki at samtykkja uppskotið. Hvat skal tingið samtykkja: linjuføring 1,2,3... ella 9 ella er tað frítt val. Tað ber snøgt sagt ikki til. Og tá situr Heini O Heinesen eftir við Svarta Peri.

Nei, norðingar nýtast ikki at vera bangnir fyri, at fasta sambandið ikki verður veruleiki. Eingin rættsiktaður fer at tosa um annað enn fast samband millum Eysturoy og Borðoynna til frama fyri landið alt, men málið má vera borðbart. Teir, sum nú sita, høvdu ikki stundir at gera arbeiði til lítar, og tí skal tað nú brúkast til politiska kastibløku. Hetta álvarsmál fyri tykkum og okkum hevði annað uppiborið.